# Sjálvandi skulu býráðslimir útbúgva seg – men í løtuni eru umstøðurnar serligar



GUNVÁ VIÐ KELDU
borgarstjóri

**Í mínari viðmerking til Norðlýsið um skeiðið í Íslandi fyri býráðslimir, segði eg, at hesi eru bæði áhugaverd og mennandi, men umstøðurnar í Klaksvíkar Kommunu eru serligar í løtuni**

Tað skal ein góður vilji til at misskilja mína stuttu viðmerking til Norðlýsið, tá ið blaðið herfyri spurdi, hví Klaksvíkar Kommuna ikki verður við í skeiðnum í Íslandi, sum KSF skipar fyri í mars mánaði.

Evnið í nevndu grein hjá Norðlýsinum var luttøkan hjá Klaksvíkar Kommunu og ikki skeiðið sum heild.

Eg varð spurd av blaðnum, hví Klaksvíkar Kommuna hesaferð hevur valt at lata vera við at luttaka í hesum skeiðnum, og so greiddi eg stutt frá orsøkini.

Samstundis legði eg dent á – sitat: "at skeiðini eru sera áhugaverd og serliga mennandi fyri tey sum eru nývald, og eisini føli eg, at vit hava fingið nógv gott burtur úr – sum m.a. samanhald og samstarv millum kommunustýrislimir í ymiskum kommunum".

Tí skilji eg ikki útleggingina og reaktiónina hjá Heðini Mortensen, formanni í Kommunusamskipan Føroya, men hinvegin eri eg fegin um, at hann ger vart við seg, soleiðis at eg fái høvi at afturvísa møguligar misskiljingar.

**Serligar umstøður**

Sum heild í Føroyum og ikki minst her í Klaksvíkar Kommunu eru tær vinnuligu umstøðurnar heilt serligar í løtuni, og tí letur tað seg ikki gera hjá okkum at taka lut í øllum, sum vit áður hava gjørt. Eisini noyðast vit at takka nei til skilagóð tiltøk sum eitt nú hetta skeiðið, og orsøkin er snøgt sagt, at vit í løtuni hava ikki fíggjarligar umstøður.

Umleið 95% av útflutningsvirði Føroya stava frá fiskivinnuni, og tað er øllum kunnugt, at høvuðsvinna okkara í løtuni er sera illa fyri. Tað hevur fyrr víst seg, at kreppur í vinnuni raka Klaksvík skjótt, og soleiðis er eisini hesaferð.

Í løtuni eru partar av fiskivinnuni illa fyri. Eitt nú er Kósavirkið her í kommununi framvegis afturlatið, arbeiðsloysið er vaksandi, og fiskiskipini eru fleiri í tungum sjógvi.

Býráðið hevur umrøtt hetta málið, og er avgerð tikin um, at vit sjálvi taka stig til eina røð av styttri skeiðum fyri býráðslimir.

# Viðmerkingar frá Atlantic Airways til tíðindaflugning í Kringvarpinum um partabrævahandil



CHRISTIAN ANDREASSN
nevndarformaður

Í sambandi við áhaldandi tíðindaflutningin hjá Kringvarpi Føroya um keyp av partabrøvum í Atlantic Airways skal eg við hesum gera hesar viðmerkingar.

Handilin við partabrøvunum fór fram í fullum opinleika og varð fráboðaður virðisbrævamarknaðinum í summar, eftir at nevndin hevði fingið góðkenning frá felagsins regluvørði at fremja handilin. Heimildina at keypa fyri 10 prosent í yvirkursi, ið svaraði til 230.000 kr., hevði nevndin í viðtøkunum hjá felagnum.

Viðvíkjandi virðisásetingini metti nevndin, at av tí, at nærum ongin umsetningur var í partabrævinum hjá felagnum, var partabrævið meira vert, enn dagskursurin á 219 vísti. Innara virðið í felagnum svaraði eisini til umleið kurs 240. Nevndin metti eisini, at tørvandi umsetningurin stavaði m.a. frá óvissuni um framhaldandi einskiljing av felagnum, sum annars var sett út í kortið, tá íleggjarar settu pening í felagið upprunaliga.

Avgerðin um at keypa partabrøvini varð tikin, tí nevndin metti, at keypið avgjørt var í felagsins áhugamálum. Leiðsla felagsins ynskti at umskipa síni ognarviðurskifti og hevði í umbúna at selja síni partabrøv til ein av stóru partaeigarunum í felagnum. Hetta helt nevndin vera óheppið, tí spurnartekn kundi fara at verða sett við óheftnið hjá leiðsluni.

Nevndin gjørdi tí av at keypa helmingin av partabrøvunum og gjørdi eina nýggja management-avtalu við leiðsluna, sum knýtti hana tættari at felagnum. Felagið stóð í juni í fjør fyri sera nógvum og stórum avbjóðingum, sum allar kravdu fullan innsats bæði frá nevnd og leiðslu, og á hendan hátt vildi nevndin skapa stabilitet í felagnum.

Eftir at nevndin fyrstu ferð hevði kunnað Vinnumálaráðið um málið, vendi ráðið sær til ein eksternan serfrøðing í partafelagsrætti at fáa viðmerkingar um handilin.

Serfrøðingurin mælti tann 27. juni 2008 Vinnumálaráðnum frá at fremja nøkur rættarstig mótvegis nevndini. Eisini mælti serfrøðingurin Vinnumálaráðnum frá at kalla inn til eykaaðalfund til val av nýggjari nevnd. Í staðin mælti serfrøðingurin Vinnumálaráðnum til at biðja nevndina fyri Atlantic Airways um eina frágreiðing um málið.

Tann 3. juli 2008 gav nevndin fyri Atlantic Airways Vinnumálaráðnum eina skrivliga frágreiðing um málið. Eftir hetta fekk nevndin tann 31. juli 2008 fráboðan um, at frágreiðingin hjá nevndini var tikin til eftirtektar, og at Vinnumálaráðið sum høvuðspartaeigari felagsins ikki ætlaði at taka onnur stig í málinum.

Nevndin hevur eisini givið teimum stóru privatu partaeigarunum í felagnum eina frágreiðing um málið. Sum úrslit av hesum sendu fleiri av stóru privatu partaeigararnir tann 26. og 27. juli 2009 skrivliga fráboðan til Vinnumálaráðið um, at teir tóku fult undir við avgerðini hjá nevndini um at keypa nevndu partabrøv, samstundis sum viðkomandi partaeigarar viðmerktu, at bæði nevnd og leiðsla høvdu teirra fulla stuðul.

Í Kringvarpi Føroya hava danskir serfrøðingar úttalað seg um málið í seinastuni, men eftir nevndarinnar áskoðan kenna hesir serfrøðingar ikki umstøðurnar hjá Atlantic Airways og umstøðurnar við eitt nú vantandi umsetningi og prísáseting í partabrævinum seinasta summar.

Nevndin fyri Atlantic Airways metir hetta mál at vera avgreitt og ætlar sær ikki taka fleiri stig í málinum.

Tó metir nevndin tað vera sera týdningarmikið fyri felagið og tess íleggjarar, at politiski spurningurin um framhaldandi einskilving verður avgreiddur, og at mannagongdirnar millum felagið og høvuðspartaeigaran verða lagdar í trygga legu, so tær samsvara við ásetingarnar fyri feløg skrásett á partabrævamarknaðinum.

# Peningastovnar skulu ikki reka fíggjarpolitikk landsins og mugu taka í egnan barm



HØGNI HOYDAL
Vegna Tjóðveldi

**Felagið Peningastovnar villleiðir um uppskot hjá Tjóðveldi, ið skal rætta ein óneyðugan skattafyrimun til spekulasjón**

Felagið Peningastovnar er nú farin í hernað mótvegis einum uppskoti hjá Tjóðveldi um at taka av ein serligan skattafyrimun til tey, ið læna sær pening at keypa partabrøv fyri. Uppskotið leggur dent á, at hetta verður gjørt frameftirvirkandi, tí vit halda, at fólk eru lokkað av politikarum og peningastovnum at seta seg í óneyðuga skuld.

Tað er ikki óvanligt, at peningastovnar og stórfyritøkur reka lobby-virksemi mótvegis politisku skipanini og tað hava tey sjálvsagt loyvi til. Meira óvanligt er tað kortini, at teir fara í almennan hernað móti einum uppskoti hjá einum flokki og fáa fría talutíð í almennum fjølmiðli, uttan at fáa ein kritiskan spurning.

Eg undrist stórliga á, at peningastovnar koma fram við slíkum, nú altjóða fíggjarkreppan hevur avdúkað, at íløgur, ið byggja á læntar pengar og hugsjónina um skjótan og léttan vinning, eru atvoldin til stórar trupulleikar fyri vinnu, húsarhald og skattaborgarar.

Í øðrum londum verður kikarin nú settur á ein fíggjarmarknað, ið hevur funnið nýggjar lánshættir við avdráttarfríum láni, skattafyrimunum og endurútlánum, ið hava víst seg at verða bygdar á luft – og politisku skipaninirnar hava ikki bert forsømt at regulera hesi viðurskifti, men hevur givið serliga fyrimunir til spekulasjónina.

Tann broytingin í kapitalskattalógini, sum Tjóðveldi hevur mótmælt harðliga frá byrjan og sum nú aftur verður roynt at broyta frameftirvirkandi, varð sett inn í kapitlavinningskattalógina við einum broytingaruppskoti frá samgonguumboðunum í fíggjarnevndini í 2006. Broytingin var als ikki viðgjørd og lýst og hevði onki við upprunauppskotið um kapitalvinning at gera.

Broytingin eggjar til, at heldur enn at nýta av eginpeningi til at keypa partabrøv, skal tað loysa seg betur hjá privatfólki at lána sær peningin til at keypa partabrøv fyri. Hetta elvir sjálvsagt til, at meiri læntur peningur kemur inn á partabrævamarknaðin, og bankarnir fáa møguleika at læna meira út og tjena uppá renturnar av hesum.

Hetta er sostatt ein skipan, har tað almenna og skattgjaldarin skulu geva serligar skattafyrimunir til tey, ið lána sær til partabrøv, og landið gevur harvið eisini ein óbeinleiðis stuðul til bankarnar, sum fáa rentuinntøkurnar av hesum útlánum.

At hetta hevur eggjað fólki til at læna sær pening til partabrøv er staðfest. Tað áttu eisini bankaleiðslur at kent alt til

Fyri tey, ið kunnu fáa slík lán, gevur tað sjálvsagt øktar nýtslumøguleikar, í mun til tey, ið ikki hava møguleika at fáa slík lán.

Somuleiðis undrist eg á, Felagið Peningastovnar villleiðir um uppskotið hjá Tjóðveldi, har felagið rør fram undir, at Tjóðveldi vil taka alla lógina um kapitalvinning frá 2001 úr gildi. Tað er skeivt.

Felagið Peningastovnar vil eisini í tíðindaskrivi vera við, at uppskotið hjá Tjóðveldi ger seg inn á ein sunna íløgumentan í Føroyum.

Til tað er bert at siga: Um føroysku peningastovnarnir og teir politikarar, ið hava samtykt serligar spekulasjónsfyrimunir fyri lán til partabrøv, halda hetta vera sunna íløgumentan, so hava teir lært lítið av bæði farnum kreppum og tí, sum hendir í heiminum í dag.

Tjóvðveldi ætlar ikki at lata seg trýsta av peningastovnum, ið skulu hugsa um sína egnu inntjening, til at reka ein ábyrgdarleysan fíggjarpolitikk. Hinvegin vil Tjóðveldi stríðast fyri, at bæði eftirlit og reglur fyri fíggjarmarknaðin verða munandi herd sum skjótast.

Íløgur hjá privatfólki í partabrøv eiga at byggja á, hvat tú veruliga hevur ráð at gjalda. Og tekur tú lán til parta- og virðisbrøv, mást tú sjálvandi gjalda renturnar av lánunum uttan nakran frádrátt.

Og Tjóðveldi heldur, at tað hevði sømt seg peningastovnunum og leiðslum tess at tikið í egnan barm – ikki minst nú teir ikki fíra fyri at koma til politiskar myndugleikar og skattaborgararnar eftir hjálp, tá ósunn íløgumentan hevur lagt fíggjarheimin og allan heimin lamnan.